


*Brúkaratalið av antivirus-loysnunum hjá Bullguard varð í vár mett til 15 mió. Nýggja avtalan gevur felagnum møguleika at taka lopið heilt upp móti teimum størstu á marknaðinum*

# Bullguard í evropisku elituna

**Bullguard við føroyska Heina Zachariassen sum stjóra, hevur gjørt sáttmála við ein av størstu telduframleiðarunum í Europa. Frá í heyst verða allar teldur frá týska Medion seldar við Bullguard virusverju sum standard**

KUNNINGARTØKNI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani stovnanina í 2002 er danska Bullguard vaksið við rúkandi ferð. Somikið nógvari, at føroyski stjórin og medeigarin í fyritøkuni, Heini Zachariassen, fyrr í ár varð nomineraður millum tey 100 evnaríkastu ungu vinnulívsfólkini í Danmark.

### Upp í superliguna

Millum annað varð hetta grundað í metskjóta vøk–sturin hjá fyritøkuni, sum ár um ár hevur tvífalda um–setningin, og fyri stuttum gjørdi fyritøkan enn eitt skarvslop í so máta.

Tað er nevnliga eydnast Bullguard at fáa í lag sáttmála við týska Medion, sum er ein av størstu teldu–framleiðarunum í Europa. Sáttmálin inniber, at frá verksmiðjuni verða allar teldur hjá Medion seldar við Bullguard virus-verju, og føroyski stjórin staðfestir, at hetta er eitt risafet hjá Bullguard.

- Hetta er eitt sera týðandi fet fyri okkum. Medion er ein fyritøka, sum fær fatur á nógvum nýggjum PC-brúkarum, og við hesi avtaluni kunnu kundarnir frá fyrsta degi venjast við at nýta Bullguard-loysnir. Og tað kemur vónandi at ávirka komandi preferansurnar hjá kundunum, sigur Heini Zachariassen, sum eisini kallar fetið fyri eitt lop upp í superliguna.

- Vit hava áður gjørt lík–nandi avtalur við smærri telduframleiðarar so sum Amitech og Zepto. Men at fáa sáttmála við Medion eru vit fluttir upp í superliguna at kalla. Tað, at vit megna at gera sáttmála við ein av størstu fram–leiðarunum í Europa er ein verulig kvalitetsstempling av okkara fyritøku. Bæði tí hetta prógvar, at okkara vøra er nóg góð, og tí Medion ikki velur ein veitara, uttan at tey eru 100% vís í, at vit altíð megna at levera vøruna

### A-klassin

Men hvussu langt upp flytur hetta tykkum á marknaðinum, har eitt nú Norton og onnur eru teir dominerandi á mark–naðinum?

- Hetta flytur okkum nógv longur upp. Innan teldu–framleiðarar verður ofta tosað um A- og B-Brand, har A-Brands eru tey heilt stóru merkini. Vit hava undan hesum havt avtalur við nøkur B-Brands, men hetta er so fyrsta A-merkið, sum vit hava gjørt avtalu við. Og tað í sjálvum sær er ein blástempling av okkara vørumerki. Og kunnu vit fáa ein framleiðara, sum telist millum teir tíggju størstu í Evropa, so er einki, sum forðar fyri, at vit eisini kunnu fara í holt við hinar níggju, sigur Heini Zachariassen.

*Heini Zachariassen, stjóri, sigur, at málið nú er at fara eftir næsta risanum á marknaðinum*



# Gates-way

At gera sáttmálar um rit–búna við telduframleiðarar er nakað, sum seinasta tíggju-ára skeiðið hevur vundið alt meira upp á seg.

Hugskotið er aloftast, at fyritøkur, sum selja ritbúna, her hava møguleika at bíta seg avgerandi fastar á part av marknaðinum. Bæði við atliti til at venja nýggjar brúkarar at nýta teirra ritbúna. Og tí hetta í næsta ættarliðnum kann viðføra stórar inntøkur til fyritøkuna.

Heini Zachariassen vil ikki siga nakað um avta–luna, sum er gjørd við týska Medion, men líkist hon øðrum avtalum av líknandi slag, so er tað ikki so, at Bullguard selur hvørt ein–stakt virus-forrit til fullan handilsprís. Vinningurin í fyrsta søluliðnum er nevnliga ikki so stórur, men eftir eina tíð skal lisensurin hjá ymsu brúkarunum endurnýggjast, og tá er tað, at sølan veruliga kann taka dik á seg. Og tað ger hon somuleiðis, um brúkarin er somikið væl nøgdur við skipanina, at hann eisini velur Bullguard, næstu ferð virus-forrit skal keypast.

Tað var tann nú so múgvandi Bill Gates, sum var fyrstur at gera sær dælt av hesum handilshátti innan telduheimin. Hann var skjótur at síggja, at IBM var í holt við at skapa ein nýggjan standard innan heimateldur. Og skjótari enn nakar annar dugdi tann un–gi Bill at síggja, hvussu stór útbreiðslan av teldum fór at vera. Ikki bara frá IBM men frá øllum møguligum øðrum framleiðarum, sum fóru at gera teldur eftir IBM-standardinum.

Um tað mundi kappaðust tríggjar stýrisskipanir á marknaðinum, men Gates gav tó IBM besta tilboðið. Hann vildi nevnliga lata MS-Dos ókeypis til allar heimateldur, sum IBM seldi.

Fyrstu tíðina kundu fólk so velja millum trí–ggjar ymsar útgávur av IBM, men tá útgávan við MS-Dos var væl bíligari enn hinar, gjørdist hon skjótt altdominerandi á marknaðinum. Eisini hóast Gates sjálvur hevur viðgingið, at skipanirnar hjá kappingarneytunum í nógvar mátar vóru betri.

Vinningurin hjá Micro–soft og Bill Gates var, at MS-Dos nú setti standardin á marknaðinum. Mest sum øll forrit vórðu nú gjørd til MS-Dos Og tá HP, Compaq, Olivetti og aðrir framleiðarar nú fóru í holt við at yvirtaka PC-marknaðin, máttu hesi keypa rættindini til skipanina frá Microsoft. Og somuleiðis mátti brúkarin keypa uppgraderingar av Dos, so hvørt sum hesar komu.

Í dag finst valla ein heimatelda, sum ikki nýtir skipanir frá Microsoft…

**-mørk**

## Sleppið undan gloppum

Fyri KT-trygdina hjá einstaka brúkaranum er tað ein veldugur fyrimunur, um virus-verja er á telduni, longu tá hon verður latin frá verksmiðjuni.

- Fyri trygdina hevur tað sera stóran týdning, at tað ikki íkoma nøkur tíðarglopp millum keyp av teldu og virusverju. Tað er eisini fremsta orsøkin til, at vit aktivt hava leitað eftir samstarvsfeløgum in–nan framleiðarar, sigur Heini Zachariassen.

Við hesum sipar hann til, at tað onkra tíð kann vera so, at brúkarar ikki keypa sær virus-verju, fyrr enn skaðin er hendir. Altso eftir at brúkarin hevur verið fyri virus-álopi. Tá kann tað eisini vera ov seint, tí dáta kunnu tá vera mist, og so skal óneyðug tíð og orka nýtast til at endurskapa tað, sum mist er.

**-mørk**

# Hans Mourits gjørdist borgarstjóri

Á fundi í gjárkvøldið varð bygdaráðið í Gøtu umskipað. Nýggjur borgar–stjóri fyri Páll Isholm er Hans Mourits Foldbo.

Tað var eftir egnum ynski, at Páll Isholm valdi at gevast sum borgarstjóri. Fyrst og fremst, tí hann eisini er skúlastjóri á Handilsskúlanum á Kambsdali, og tí ikki hevði stundir at røkja starvið sum borgarstjóri. Serstakliga ikki, nú starvið - sum ætlað - varð uppnormerað til fulla tíð.

Nýggjur maður í heil–tíðarstarvið sum borgarstjóri er Hans Mourits Foldbo. Hans Mourits, sum er út–búgvin lærari við sergrein innan barnasálarfrøði, er upprunaliga leirvíkingur, men seinnu árini hevur hann bú í Gøtu.

Og eitt av fyrstu geramálum hansara sum borgarstjóri verður at leiða kommununa í ætlaða samanlegging við júst Leirvík.

**-mørk**